# Adjágas við inniligum joiksangi

**Fyrsta konsertin á sandinum leygardagin var ein vøkur og eym konsert við sámiska bólkinum Adjágas. Konsertin var nokkso tíðliga um dagin, og fá fólk vóru komin at lurta eftir hesum forkunnuga bólki**

UMMÆLI
*Oddur á Lakjuni*
*oddur82@gmail.com*


Mynd: Sunva E. Lassen
*Spæligleðin lýsti av sámisku Adjágas*

Tónleikurin hjá Adjágas er fólkatónleikur, sum allatíðina er borin uppi av joiksanginum hjá teimum báðum Sara Marielle Gaup og Lawra Somby. Tað eru fyri tað mesta tey bæði, sum mynda tónleikin.

Afturat teimum báðum vóru fýra tónleikarar. Trummur, bass, elgittari, og so ein tónleikari, sum skifti ímillum at spæla banjo, trompet og blásiorgul. Hann legði eitt serligt huglag á ljóðið, og var ein stórur partur av sterka útrykkinum.

Fyri tað mesta var tað rættiliga friðarligur tónleikur, har siðbundni joikasangurin var í miðdeplinum. Ein inniligur og viðbrekin sangur, sum varð borin fram við eymleika og kærleika. Tað kendist, at hetta var ektað, og hevði rót.

Onkuntíð bygdi tað tó upp til meira larmutan rokk. Tann eini sangurin var ein seigur bluessangur, sum so breyt út í bluesrokk. Hesar villaru løturnar breyt Sara onkuntíð út í ein spontanan dans, og einaferð fór bassspælarin eisini at dansa ein villan og heldur undarligan dans.

Tað vóru hesir meira lívligu sangirnir, sum komu best tvørturum til áhoyrarnar. Tónleikurin var annars nokkso innatvendur, og tað tyktiskt ikki, sum um øll høvdu hug at lurta allatíðina. Men eisini hesir sangirnir høvdu sína styrki í vakra, og á ein hátt, hypnotiserandi joiksanginum.

Sangirnir eru søgur og frásagnir, og ímillum teir greiddi Lawra frá. Hetta er tónleikur, sum er rótfestur í teirra sterka sámiska samleika, og tú merkti nærleikan, sum tey hava til tað, sum tey syngja. Tey liva í hesum, og sangurin er ein samanrunnin partur av teirra tilveru.

Tey sungu bara á sámiskum, men hann greiddi frá á norskum, so áhoyrarnir fingu við, hvat løgini snúðu seg um.

Tað sást, at tey elska tað, tey gera. Spæligleðin lýsti av teimum. Tey bæði Sara og Lawra lótu seg ríva við í huglagið, og vóru til tíðir mest sum burturi í øðrum heimi. Tey fluttust kanska yvir í "Adjágas" - sinnisstøðuna ímillum svøvn og vøku.

Kanska hevði hetta riggað betur á einum minni palli, har tey vóru tættari við áhoyrararnar. Spjaddu fólkini á sandinum fingu tó eina vakra og forkunnuga konsert.

# Endin á G!

**Tað, sum byrjaði við Kára Sverrissyni tíðliga hóskvøldið, endaði við einum óhugnaligum og einum hugnaligum surprise og einari stórari fólkarokkkonsert**

UMMÆLI
*Meinhard Jensen*

### Svarti Deyði

Festivalurin endaði við einum surprise. Tað byrjaði við, at vit hoyrdu eina upptøku av kingosangi frá einari jarðarferð í Tjørnuvík, meðan ein svartur bátur við deyðum fólki róði inn á sandin og so útaftur. Hetta riggaði væl, tí at tað lýsti í sjónum undir bátinum, og yvirhøvur var tað pent at síggja, tí har lógu so nógvir vakrir bátar. So kom Egi Dam á pallin í svørtum og helt eina óhugnaliga talu um sandin, sum vit stóðu á. Í 30unum var ringt brim har, og ein gamal kirkjugarður kom undan. Beinini vóru frá miðøldini. Boðskapurin var, at G!Festivalurin verður hildin oman á líkunum, sum doyðu av svartadeyða. Hetta var gott, men eitt sindur langt. Stóri boðskapurin var, at einaferð um árið koma vit saman av avnokta deyðan, og so fór poppmusikkur í gongd, og ein bólkur av kvinnuligum dansarum tóku yvir og dansaðu ein flottan dans í vøkrum búnum.


Mynd: Sunva E. Lassen

### Young Dubliners

Síðani komu Young Dubliners framat. Tað var ein festligur endi. Sera væl spældur írskur fólkatónleikur blandaður við rokk. Bestu sangirnir hjá teimum vóru teir, har sum tað írska domineraði. Vit elska at hoyra rós, og rós treyt ikki ta løtuna. Konsertferðin hjá teimum endaði her, og tað hildu teir vera ógvuliga passandi. Tað er við skomm, at eg viðgangi, at eg ikki kenni Young Dubliners, annað ein tveir sangir úr útvarpinum. Men hatta slagið av tónleiki fer lættliga inn, og onkur av løgunum eru gomul og kend. Fyri meg vóru tey tey bestu, og framúr góð. Millum tað besta allan festivalin. Teir høvdu onkrar sangir, sum ljóðaðu heimagjørdir og persónligir, og alt gott um tað, men har var verri at fylgja við, og tað var heldur ikki líka áhugavert. Teir spældu so væl, sum tað ber til, og ljóðið var, sum altíð á sandinum hendan G!Festivalin, óvanliga gott. Fiólin var góð, og sangarin hevði tað upp á pláss við hasum írska, sum vit kenna frá gomlu Dubliners og Clancy beiggjunum og øðrum.

### Dixie reprise

Basssangarin og tveir tónleikarar úr Dixie Hummingbirds komu til allarseinast út at syngja fyrsta ørindi av sálminum Amazing Grace, tvær ferðir. Fólk sang við, og tað kendist sum eitt vælsignilsi. Noomi og Heidi eiga æruna av, at tað kom í lag.



Mynd: Sunva E. Lassen



Mynd: Sunva E. Lassen